


SKÚLATING

*- Mær dámar væl at ganga í skúla, sigur seks ára gamli Martin Óli Arge úr Søldarfirði. Hann er væl útgjørdur til ein strævnan skúladag*

# Stuttligt at ganga í skúla

**NÆMINGUR** - Eg haldi, at tað er stuttligt at ganga í skúla, sigur tann skjótt sjey ára gamli, Martin Óli Arge úr Søldarfirði. - Man skrivar, spælir, teknar og alt møguligt

Snorri Brend

Tað var ein spennandi dagur, tá Martin Óli mánadagin í farnu viku á fyrsta sinni trein inn um skúlans gátt í fkatólska fri... 

Eitt nýtt kapittul var byrjað í hansara lívi, nú hann á fyrsta sinni kann kalla seg skúlanæming.

Í longri tíð hava fólk í samkomuni Kelduni í Skálafirði arbeitt við at fyrireika frískúlan, og tá hinir skúlarnir byrjaðu eftir summarsteðgin, byrjaðu tey eisini her.

Útbúnir lærarar vóru fingnir til vega, og skúlaleiðarin, Jastrid Høj kundi gleðast um, at átta børn byrjaðu í hesum fyrsta kristna frískúlanum í Føroyum og at fleiri eisini tóku við tilboðnum um frískúla, forskúla og frítíðarstovu.

Allur tann nýggjasti skúlaútbúnaðurin er fingin til vega, soleiðis at undirvísingin kann vera á hædd við hana, sum aðrir næmingar í 1. flokki fáa í øðrum skúlum.

Hóast játtan frá Mentamálaráði bæði um skúlaætlan, tímatal og næmingatal, vantar enn nakað í at fáa javnvág í raksturin. Men aftanfyri skúlan stendur samkoman Keldan, sum í sínum visjónum hevur ætlanir um ein kristnan frískúla.

Martin Óli er komin í ein lítlan skúla við smáum flokkum, her lærarin hevur góða tíð til tann einstaka næmingin og har størri dentur verður lagdur á tey kristnu virðini. Og her hevur hann eisini møguleika at verða mentur á øllum økjum - bæði í kunnleika, sosialt, likamliga og ikki minst andaliga.

Hetta eru alt viðurskifti, ið lítli Martin Óli neyvan hugsar størvegis um. Fyri hann og tey, sum eru rundan um hann, hevur tað alt at týða at umstøðurnar eru góðar og at hann kann læra tað sum hann skal.

- Tað er í fínasta slag at ganga í skúla, slær ungi søldfirðingurin fast.

## Lært nógv

Martin Óli hevur fingið pláss í fremsta raði, uttast við vindeyguni.

Hóast hesa plasering fylgir hann væl við í undirvísingini. Hann roynir sum frægast at gera vart við seg, tá Birna setir teimum ein spurning fyri og annan eftir, fyri at halda samrøðuni um bókstavirnar gangandi.

Nú hann hevur gingið í skúlanum í samfullar fimm skúladagur, er tíðin vist komin til at gera støðuna upp:

- Eg havi lært nógv. Vit hava lært um bókstavin Á, og eitt sindur um bókstavin L. Hetta dámar mær væl, sigur ungi næmingurin.

## Tá eg verði stórur

Martin Óli kemur úr Søldarfirði, og má tí eitt sindur fyrri upp á morgni enn onkur av hinum næmingunum, sum býr í Skálafirði.

- Tað ger einki. Eg orki væl at fara upp um morgunin, sigur hann avgjørdur.

Hann hevur tvey eldri systkin sum eisini ganga í skúla, tó ikki her í frískúlanum, tí tey eru eldri enn hann.

Fyri Martin Óla kennist tað gott at ganga í skúla. Skúlin er góður og flokslærari hansara, Birna dugir ordiliga væl.

- Eg veit ikki rættiliga, hvat eg fari at blíva til, tá eg verði stórur, sigur Martin Óli Arge.

Men hann hevur nøkur ár aftrat frammanfyri sær, til tess at fáa greiðu á tí spurninginum.

snorri@sosialurin.fo

# LAKSU

**FRÍSKÚLI** Klokkan er nakrar fáar minuttir í 9 fríggjadagin, tá bæði lærari og næmingar eru klár til dagsins fyrsta tíma. Fimti dagur í kristna frískúlanum Keldan er um at byrja. - Ja, gerið so væl, og seti tykkum niður við borðini. So kunnu vit byrja, sigur Birna Vestergaard, flokslærari í 1. flokki

Orð&myndir: Snorri Brend

**Í Skálafirði:** Hetta er sum einhvør onnur skúlastova í einumhvørjum nútíðar fólkaskúla í Føroyum.

Øll neyðug útgerð til undirvísingina er tøk. Bøkurnar eru har. Samvirkna talvan er har. Ein flokslærari, ið hevur royndir við innskúlingini er har. Og haraftrat er skúlagongdin í Bláu stovu, har teir bláu litirnir eru eyðsýndir, m.a. við litinum á gardinunum.

Teir átta næmingarnir eru setstir, hvør við sítt egna borð, og ein av dreingjunum, Martin Óli baksast hesa løtuna við at fáa taskuna upp at hanga. Og so nær hann akkurát at siga hey við ein annan, ið situr beint aftanfyri hann og sum hevur gingið í somu dagrøkt sum hann.

- Hey Dánjal, sigur Martin Óli, sum kemur úr Søldarfirði hvønn morgun.

Birna riggar telduna til, alt meðan klokkan nærkast løtuni, tá skúladagurin skal byrja. Fá sekund yvir 9 biður hon næmingunum góðan morgun: "Góðan morgun, fyrsti flokkur".

Tey eru skjót at svara aftur og heilsa lærara teirra við sama svari, soleiðis at dagurin kann fáa eina góða byrjan. Lærarin takkar fyri, og biður nú næmingarnar sita stillar, tí nú skulu tey byrja sum tey plaga - við morgunsangi og bøn.

Birna takkar Gudi fyri tann nýggja dagin, fyri hvønn einstakan næming, og biður Hann vera við teimum øllum henda fimta skúladagin í frískúlanum.

> **Man skrivar, spælir, teknar og alt møguligt**
>
> MARTIN ÓLI ARGE, NÆMINGUR

- Ger tað eisini so, at næmingarnir kunnu læra ordiliga nógv, og at tey eisini verða góð hvør við annan, biður hon.

Tey syngja síðani tveir kendar barnasangir sum kendir eru úr sunnudagsskúlanum. Hvør teirra syngur við sínum munni sjálvandi,



INNKOYRING

*Birna Vestergaard er flokslærari hjá 1. flokki og arbeiðir eisini nakað í frítíðarstovuni. Hon hevur áður arbeitt sum lærari í Runavík, eisini við innkoyring av næmingum*